## Ákærdur fyri eldáseting

Ákæruvaldið í Los Angeles hevur ákært ein 13 ára gamlan drong fyri at hava kynt eldin, sum endaði sum ein stórur skógareldur nærhendis stórbýnum í síðsta mánaði. Myndugleikarnir hava í fyrra lagi ákært drongin fyri at hava sett eld á, og í øðrum lagi er hann ákærdur fyri at hava verið óskettin við eldi í einum skógi. Um somu tíð herjaði ein annar skógareldur uttan fyri Los Angeles. Hann oyðilegði næstan 70 hús, men tann 13 ára gamli drongurin er ikki ákærdur í sambandi við tann eldin, skrivar AP. Sambært kaliforniskari lóg kunnu fólk fáa upp í 25 ára fongsul fyri eldáseting.



## Kunnu tapa kríggið

Verða ikki fleiri útlendskir hermenn sendir til Afghanistan, er vandi fyri, at stjórnarherurin og teir útlendsku hermenninir tapa kríggið. Tað skrivar amerikanski generalurin Stanley McChrystal í einari frágreiðing, sum blaðið Washington Post hevur fingið fatur á. Í frágreiðingini, sum er heilar 66 síður, skrivar Stanley McChrystal, at tað er neyðugt at venda gongdini innan eitt ár, skal tað, sum hóast alt er vunnið, ikki fara fyri bakka. USA hevur í løtuni 60.000 hermenn í Afghanistan, men herleiðslan fer væntandi at biðja um 30.000 afturat, skrivar Washington Post.

# Nýmótans Barbara í Løkshøll



**Hon varð fødd heima í Havn í 1667. Men hóskvøldið 1. oktober verður Barbara framførd sum ein nýmótans dansileikur í Løkshøll í Runavík**

DANSILEIKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Dansileikurin Barbara, sum er eitt nýmótans verk eftir danska koreografin Ingrid Tranum og føroyska tónaskaldið Trónd Bogason, verður frumframførdur í Løkshøll í Runavík hóskvøldið 1. oktober kl. 19.30 og í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið 3. oktober klo 19:30.

Barbara byggir á skaldsøguna hjá Jørgen-Frantz Jacobsen við sama navni. Í leikinum verður søgan um Barbaru søgd á ein nýggjan hátt gjøgnum dans, tónleik, rørslur og ljóð. Eisini vera beinleiðis innsløg á stórskíggja. Tónleikurin tekur støði í gomlu Kingusálmasiðvenjuni og verður tulkaður gjøgnum kórsang, upplestur og elektroniskan tónleik.

Dansileikurin varð valdur sum danska umboðið á EXPO í Spania í 2008, sum er heimsins størsta mentanartiltak. Sýningarnar í Føroyum eru partur av norðurlendskari rundferð hjá Barbara-hópinum.

Tað eru dansarar frá Saga Dance Art Collective og føroyski tónleikabólkurin Mpiri, sum framføra verkið.



*Almennu plakatina í ár hevur svenska Mona Rönningen málað*

# Kríggj og friður í Norðurlondum

BÓKASAVNSVIKA
*Tíðindaskriv*

Dagarnar 9. - 15. november verða Norðurlendska bókasavnsvikan og Skýmingarløtan 13. árið á rað. Skýmingarløtan er eitt av størstu tiltøkunum við upplestri, ikki bara í Norðurlondum, men í allari verðini. Síðsta ár luttóku næstan 2000 stovnar í átta ymiskum londum úr Norðurlondum og Baltalondum.

Evnið í ár er Kríggj og friður í Norðurlondum, og serliga verður ljóskastarin settur á Merkisárið 1809 og sundurbýtingina av gamla svenska ríkinum í tvey lond - Svøríki og Finnland. Men evnið fevnir eisini um alla ta dramatisku norðurlendsku søguna við kríggjum, uniónum og hertøkum, sum førdi til dagsins friðarligu norðurlendsku samtilveru.

### Tekstirnir í ár

- Fyri vaksin: Yrkingin "Flaggberin Stál" úr Fänrik Ståls sägner eftir Johan Ludvig Runeberg (FI) - Hanus Kamban hevur týtt til føroyskt. Og yrkingin "Skandinavisk förstås" eftir Benny Andersen (DK)
- Fyri størri børn: Kapittul 10 úr Brøðurnir Leyvuhjarta eftir Astrid Lindgren (SE)
- Fyri minni børn: Álvur og hermannapápin eftir Gunilla Bergström (SE)

OBS! Tekstirnir kunnu takast niður frá heimasíðuni www.bibliotek.org.

Dimmalætting fyri børn er mánadagin 9. november kl. 09.00.

Skýmingarløtan fyri ung og vaksin er mánadagin 9. november kl. 19.00.

Hetta eru okkara almennu tíðir, men tiltøk kunnu eisini leggjast aðrar tíðir í vikuni.

Norðurlendska bókasavnsvikan verður fyriskipað av Meginfelag Norrønu Felaganna (FNF) og Norrænu feløgunum við stuðli frá Norðurlendska Ráðharraráðnum, svenska Kulturrådet og Norsk Kulturråd.



# Flottir gamlir bilar

**Eins og seinasta mánamorgun komu aftur í morgun ellisakfør á donskum nummarplátum við Norrönu. Talan er um limir í Dansk Veteranbil Klub, sum eru komir higar við 12 ymiskum vælhildnum gomlum bilum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í morgun kom aftur eitt ferðalag við ellisakførum at vitja. Hesaferð eru tað limir í Dansk Veteranbil Klub, sum eru komir higar við 12 ymiskum vælhildnum gomlum bilum. Dansk Veteranbil Klub er ein gamal felagsskapur, sum varð stovnaður í 1954.

Ferðaleiðari á túrinum er Erik Fey, sum eisini var ferðaleiðari á Morgan vitjanini í síðstu viku. Erik hevur ferðast nógv í Føroyum sum ferðaleiðari og hevur skrivað fleiri bøkur um føroyska list.

Í morgun hava øll ellisakførini verið í Kirkjubø, og í kvøld kl. 20 verður vitjað hjá Føroya Ellisakførum yviri við Strond í Havn.

Gomlu bilarnir verða annars at síggja ymsastaðni kring landið. Týsdagin gongur leiðin til Vestmanna, Kvívík, Saksun, Tjørnuvík og til Gjáar. Mikudagin verður farið í Norðoyggar, har steðgað verður á við kirkjuna við Gøtugjógv. Síðan verður koyrt til Klaksvíkar og til Viðareiðis. Ferðalagið fer avstað aftur við Norrönu hóskvøldið 24. september.